tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 88 Týsdagur 9. mai 2000 74. árgangur www.sosialurin.fo Kr. 10,00



## Framúrskarandi ljómur

Teir 400 ungu tónleikararnir á Musikkskúlastevnuni vóru í góðari venjing

Síða 6-7



## – Tað var genialt

At seta pengar í Føroya Kolvetni heldur fyrrverandi formaðurin í Havnar Handverkarafelag, Eyðfinn Petersen, vera genialt

Síða 8

# Landsliðið sent til hús

Meginparturin av leikarunum á U-20 hondbótslandsliðnum hava fingið at vita, at teir ikki kunna vera við í nøkrum arbeiði hjá Hondbóltssambandinum komandi fýra mánaðirnar

## Landsbankin og Hagstovan skulu leggjast saman

Tað arbeiðið, Hagstovan, Landsbankin og Búskaparráðið gera, líkist nógv, og tí arbeiðir landsstýrið miðvíst við at leggja saman Hagstovuna, Landsbankan og umsitingina av Búskaparráðnum



JOHN JOHANNESSEN

Fyri at fáa meira burtur úr arbeiðsorkuni hjá serkønu fólkunum á Hagstovuni og Landsbankanum ætlar landsstýrið at leggja hesar báðar stovnar saman, eins og umsitingina av Búskaparráðnum.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur seg vænta eina nógv effektivari arbeiðsgongd, verða hesir stovnar, sum í veruleikanum arbeiða við somu uppgávum, lagdir saman.

– Hetta er ein miðvís ætlan um at leggja alla samfelagsligu hagtalsviðgerðina undir eitt, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Tað er enn ikki greitt, nær stovnarnir verða lagdir saman, men sambært løgmanni fer tað í øllum førum at ganga eitt hálvt ár, áðrenn komið er so langt. Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur mannaður við starvsfólkum á stovnunum og øðrum embætisfólkum og leggur ætlanina til rættis.

Allir prentlutir í góðum hondum hjá

Spf. HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

Út í heim við Atlantic Airways

Til Stavanger í Noregi í summar - frá 17. juni

SAS Globetrotter Hotel ***
Liggur væl fyri í miðbýnum.
Flogferð og innivist v/morgunmati eru íroknað prísin.
Prísur fyri hvønn í dupultkamari
sunnud.-mikud. 2.785
1 vika 4.159 mik-sun 3.180
+ ferðaavgjald



SAS Royal Hotel***
Liggur væl fyri í miðbýnum.
Flogferð og innivist v/morgunmati eru íroknað prísin.
Prísur fyri hvønn í dupultkamari
sunnud.-mikud. 3.124
1 vika 4.789 mik-sun 3.540
+ ferðaavgjald





- vit hava nógv onnur góð gistingartilboð til tín - eisini í Bergen.
Leigubilar í Noregi kunnu bíleggjast hjá Atlantic Airways.
Ring til Atlantic Airways og hoyr nærri um prísir o.a.

Atlantic Airways
Tel 333 900

SANSIR TEL 355355

ABS TRANSPORT
Vørukoyring í Føroyum.
Flyting úr Føroyum til Føroya.
Goymsla og flytikassar.
Tilboð verða givin.
Lagaligir prísir!
Tel. 31 12 00